


## Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

**1.479,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald.

Bílegging áðrenn 4/12 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 23/10 til 15/12 2003

2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag - heimferðin skal vera mánadag.

SANSIR 355 355

ATLANTIC AIRWAYS

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo


# Eldrahugni í Skálanum


*Hjúnini Regin og Birta Rasmussen, sum júst eru flutt aftur til Føroyar, spældu harmoniku undir borðhaldinum*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Mikukvøldið var ein hugnaløta í Skálanum í Klaksvík fyri eldri. Tað var áhugabólkurin hjá teimum eldru í Norðoyggjum, sum skipaði fyri. Hetta er eitt av trimum føstum tiltøkum um árið, sum bólkurin skipar fyri**

ELDRAHUGNI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Eitt tiltak fyri eldri var í Skálanum mikukvøldið. Byrjað varð klokkan 17 við borðhaldinum. Borðreitt varð við smurdum breyði og felagssangurin rungaði eftirí.

Umframt at nýta heftini, ið vórðu gjørd í sambandi við eldrahugnaløtuna úti í Grøv fyrr í summar, hevði eldrabólkurin funnið fram nakrar sokallaðar gamlar, danskar »slagarar«. Alex Sólstein spældi undir.

Hans Eli Hansen las upp eina ferðafrásøgn. Eina gamla frásøgn um ein túr úr Fugloynni til Havnar. Tað stuttliga við henni var, at hon av røttum vísti munin á ferðasambandinum í dag og fyrr.

Túrurin frá Fugloynni til Havnar tók níggju dagar, og viðkomandi skuldi verða í Havn í átta dagar. Hetta var ein sera stuttlig frásøgn.

Og so kom eitt par, Regin og Birta Rasmussen, at spæla harmoniku.

Tað seinasta á skránni var dansibólkurin Dansihugni. Tey sýndu fram nakrar av teirra dansum, og tað lá væl fyri hjá teimum.

### Góð undirtøka

Forkvinnan í áhugabólkinum fyri tey eldru í Norðoyggjum, Gerda Absalonsen, sigur, at tey eru sera vælnøgd við undirtøkuna fyri tiltøkunum, sum tey hava skipað fyri.

– Tey møta serstakliga væl upp, og tað koma bara meira og meira fyri hvørjaferð, sigur hon. So her er uttan iva talan um teir smáu ringarnar í vatninum, sum spreiða seg. Eldrabólkurin hevur verið til síðani í 1999, og tey hava millum annað skipa fyri trimum hugnaløtum um árið. Eina um várið og eina um heystið. Og so uttandura hugnaløtuna, sum plagar at vera úti í Grøv á hásumri.

Gerda fegnast um, at tiltøkini verða so væl móttikin, og hon sigur, at við hesum røkkur áhugabólkurin einum stórum parti av sínum endamáli.


*Undirtøkan fyri tiltøkunum hjá Eldrabólkinum veksur hvørt ár*

*Mynd: Bárður Lydersen*


*Umframt at syngja úr sangheftunum frá hugnaløtuni úti í Grøv í summar, sungu tey eisini nakrar gamlar, danskar »slagarar«*

*Mynd: Bárður Lydersen*





## Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

**1.995,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 29/11 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 23/10 til 8/12 2003

2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

## Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

**2.460,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 29/11 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 20/10 til 12/12 2003

2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

SANSIR 355 355

ATLANTIC AIRWAYS

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo




# Landsbankin nærkast botninum

**Landsbankin flýtir yvir í pengum, hava vit hoyrt síðstu árini, men soleiðis verður ikki longur. Nýggi politikkurin hjá samgonguni gongur út uppá at gjalda skuld við gjaldføri Landsbankans. Og tað merkir, at vit longu næsta ár nærkast minstamarkinum fyri, hvat skal standa í Landsbankanum. Einki er kortini at óttast, sigur landsbankastjórin**

FÍGGJARLÓG 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*


*Sigurð Poulsen, landsbankastjóri, sigur tað vera skilagott av landinum at minka gjaldføri Landsbankans og gjalda skuld, tí rentan er so lág*

Tey góðu árini í føroyska búskapinum hava ført til, at gjaldføri landskassans støðugt er vaksið síðstu árini. Tað er gott at hava at standa ímóti við til ringari tíðir, men nú fjarar aftur í kassanum.

Fíggjarlógin fyri næsta ár gevur bara 100 milliónir krónur í avlopi, men tað er, áðrenn avdrátturin av láninum hjá landskassanum til danska ríkiskassan er goldin.

Hóast hildið verður fast við, at talan verður um eitt avlop komandi ár, so er tað ikki tí, at landskassin ætlar at gevast at gjalda skuld. Tvørturímóti er ætlanin at gjalda meira enn vit plaga. Munurin er bara, at tað verður ikki fíggjað gjøgnum fíggjarlógina. Farið verður í Landsbankin eftir pengunum.

### Brúka yvirskotsgjaldføri

Í august stóðu 2,2 milliardir krónur í Landsbankanum. Lógin fyri Landsbankan sigur, at minsta innlánið í Landsbankanum er 1,5 milliard krónur. Nú skuldin verður goldin av Landsbankanum, nærkast Landsbankin botninum fyri, hvat skal standa inni. Og sostatt verður ikki meira yvirskotsgjaldføri næstu árini at standa ímóti við.

Seinastu tølini vísa, at einar 90 milliónir krónur fara at resta í á landskassaroknskapinum í ár til at gjalda avdráttir av skuldini til ríkiskassan. Samgongan hevur eisini gjørt av, at 500 milliónir skulu gjaldast av skuldini úr gjaldførinum hjá Landsbankanum næsta ár. Sostatt er gjaldføri Landsbankans komið niður á 1,6 milliard krónur. Ella beint yvir minstamarkið fyri innláninum.

Tað er beinleiðis eftir uppskoti frá Landsbankanum, at landsstýrið ber seg soleiðis at, og Sigurð Poulsen landsbankastjóri sigur einki vera at óttast.

– Vit hava mælt til at gera soleiðis, tí rentan er so lág í løtuni, at vit spara pening við at minka gjaldføri og gjalda skuld. Vit fara ikki niðurum minsta innlánið, sum vit skulu hava sum trygd, so vit altíð kunnu gjalda rokningar, sigur Sigurð Poulsen.

### Bíligt at læna aftur

Siga vit, at fíggjarlógin gevur hall næsta ár, eins og tað hendir í ár, so noyðist landið aftur í Landsbankan eftir pengum, og so er botnurin náddur. Hendir tað, noyðist Landsbankin út at læna pening, tí 1,5 milliard krónur ella 15 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni skulu altíð standa í Landsbankanum sum trygd.

– Rentan er so lág í løtuni, at tað er bíligt at lána pening aftur, skuldi tað verið neyðugt. Minsta innlánið noyðast vit at hava, men vit halda bara ikki, at vit kunnu forsvara ov stórt gjaldføri, um tað gevur ov stórt rentutap, sigur Sigurð Poulsen.

### Skuldin umfíggjað

Samstundis, sum skuld verður goldin úr Landsbankanum, verður ein partur av láninum frá danska ríkiskassanum umfíggjaður. Umfíggingin hevur tvey høvuðsmál. Annað er at stuðla uppundir at fáa ein virknan virðisbrævamarknað. Hitt høvuðsmálið er at spara rentuútreiðslur.

Umleið 500 milliónir verða goldnar eyka úr landskassanum, og 1,2 milliard krónur verða harumframt fíggjaðar við lánsbrøvum. Á hendan hátt verða 1,7 milliard krónur umfataðar av umfígging og afturgjalding av uttanlandsskuld, og sparingin upp á rentur og avdráttir er umleið 30 milliónir krónur.

# Áhugaverd og spennandi evnisvika um brekað

EVNISVIKA
*Jan Müller*

Í samband við »Ár teirra brekaðu« hevur Meginfelag teirra brekaðu heitt á fólkaskúlan um at skipa fyri evnisviku um tað »at vera brekaður, at vera øðrvísi enn tey flestu«. Evnisvikan er sett til at vera í viku 41, frá 6. Til 10. Oktober. Í tíðindaskrivi frá MBF verður sagt frá, at 34 skúlar hava sagt frá, at tey ynskja at vera við til at skipa fyri eini slíkari viku á teirra skúla.

Í sambandi við evnisvikuna hevur MBF gjørt eitt hugskotshefti við uppskoti til, hvussu tað kann arbeiðast við evninum og við upplýsingum um ymiskt tilfar um brekað.

Vikan endar við stórum felagstiltaki, fríggjadagin 10. oktober millum kl. 10 og 13 uppi í Ítróttarhøllini á Hálsi, har børn úr øllum skúlunum samlast til undirhald av ymiskum slag. Tað tiltakið fer landsstýrismaðurin Páll á Reynatúgvu at seta. Síðani fara næmingar á pædagogskúlanum at framføra sjónleik, Johan í Kollafirði og hini í 2.p fara at syngja og spæla, orkestrið »Ælagoin« fer at spæla, ÍOSB og pædagognæmingar skipa fyri ítróttarspølum, M`as blues band fer at spæla og at enda ferð formaður í MBF at enda tiltakið.


TELEFONBÓKIN 2004

Seinasta freist at lata broytingar inn er fríggjadagin 7. november 2003

**Í mars 2004 verður telefonbókin fyri ár 2004 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

**Hvítu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2004 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 650 í telefonbókini 2003,ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A)+(D) Standardlýsing .......... kr. 650,00
(B) Stórt navn .......... kr. 50,00
(C) Innramming .......... kr. 100,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. kr. 25,00
(sí dømi á s. 648 í Telefonbókini 2003)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 649 í telefonbókini 2003, ið skal sendast til:
Teleforlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31
www.nummar.fo · info@nummar.fo
www.gulu.fo · info@gulu.fo